Kristian Fríðrik hevur ikki sagt upp

Útróðrarmenn eru ógvuliga misnøgdir við fiskaprísirnar í løtuni, og fleiri halda, at orsøkin til stóra prísfallið, er trotið á kørum. Ofta verður fiskurin ikki skyldur í støddir, tí ov fá kør eru at skilja fiskin í. Hetta gongur út yvir fiskaprísirnar, tí keypararnir ikki kunnu bjóða uppá tær fiskastøddir, teir vilja hava, men keypa fiskin óskyldan - Støðan er frustrerandi, sigur John Nielsen, stjóri í Fiskamarknaði Føroya

FISKAMARKNAÐUR
Vilmund Jacobsen

Hósmorgunin ljóðaði, at Kristian Fríðrik Olsen, leiðari á Fiskamarknaði Føroya í Klaksvík, hevði sagt upp, tí ónøgdin um fiskaprísir og landingarviðurskifti í stóran mun verður vend móti teimum stóru landingarmiðstøðunum í Klaksvík og á Toftum.

Í vetur segði Kristian Fríðrik í samrøðu við Sosialin, at ein av hansara størstu uppgávum var at útvega neyðugu kørini, so landingarnar kundu fara fram, og fiskurin kundi skiljast. Hesum sá hann lítla meining í, tá ið vit hava eina skipan við kørum og eina Kassamiðstøð, sum umsitur hesa skipan og eigur at syrgja fyri, at nóg mikið er av kassum og kørum.

Ikki sagt upp

Sosialurin royndi í gjár at fáa fatur á Kristian Fríðriki, men tað eydnaðist okkum ikki.

Vit fingu tó fatur á stjóranum á Fiskamarknaði Føroya, John Nielsen.

Hann avsannar, at Kristian Fríðrik hevur sagt upp.

- Eg veit væl, at hann hevði sagt okkurt um at siga upp, meðan fólk vóru til steðar, men soleiðis er tað ikki. Kristian Fríðrik hevur ikki sagt upp, og sum eg havi skilt, hevur hann ongar ætlanir um tað.

John sigur, at tað er rættiliga frustrerandi, soleiðis sum støðan er við kassum og kørum.

- Vit eru í stórum trupulleikum og fáa ikki arbeitt, soleiðis sum vit eiga at arbeiða. Tað ringasta er, at vit fáa einki gjørt við støðuna, tí vit fáa ikki fatur á teimum ílótunum, vit hava brúk fyri.

Avleiðingin er, sigur hann, at útróðrarfiskur ikki verður skildur, tá ið ringast vil til, og somuleiðis steðga landingar, tí eingi ílót eru at koyra fiskin í.

- Hetta er ein ógvuliga keðilig støða, sum serliga ger seg galdandi, tá ið nógvur útróður er. Tá ið ringast vil til, steðgar arbeiði snøgt sagt upp, og vit fáa hvørki skilt útróðrarfisk ella landað skipini, sigur stjórin.

Ov langt úti

John sigur tó, at tað er ikki bara kassatrotið, sum er orsøkin til prísfallið, men eisini tann veruleiki, at rættiliga nógvur fiskur er á marknaðinum.

- Trupulleikin gongur serliga útyvir okkum, tí tá ið fiskurin fer hiðani og til keyparar, er hann í kørum. Sostatt fáa vit ákoyringarnar - og ikki virkini, ið keypa fiskin.

Mest vanligu støddirnar av kørum eru trýggjar, 380 litrar, 460 og 660 litrar, og trupulleikin er um allan "banan".

Spurdur, um tað kann hugsast, at virkir bevíst leggja kør inn undir seg fyri at trýsta prísin á uppboðssøluni, heldur John, at tað neyvan er hugsandi.

- Tað hevði verið ov langt úti, sigur hann.

Tað vísir seg, sigur stjórin, at hvørja ferð, nýgg kør koma, so verður tørvurin ikki nøktaður kortini.

Hann heldur, at tørvurin veksur, so hvørt kørini gerast fleiri.

- Hinvegin undrar tað meg, hvat blívur av øllum teimum gomlu kørunum, sigur hann.

Hvør er loysnin?

Hann heldur, at hvørja ferð, trupulleikar eru við at taka seg upp við kørum, veksur trupulleikin so ógvuliga skjótt, tí vinnan roynir at "gardera" seg.

Spurdur, hvør loysnin er, sigur John.

- Tað finst neyvan nøkur skjót loysn, men neyðugt er at skipa so fyri, at nóg mikið er av kassum og kørum - eisini, tá ið nógvur fiskur kemur uppá land, sigur stjóri á Fiskamarknaði Føroya, John Nielsen.

Hósmorgunin ljóðaði, at leiðarin á Fiskamarknaði Føroya í Klaksvík, Kristian Fríðrik Olsen, hevði sagt upp, men tað hevur hann ikki. - Støðan er frustrerandi. Vit fáa ikki arbeitt, soleiðis sum vit eiga at arbeiða. Tað ringasta er, at vit fáa einki gjørt við støðuna, tí vit fáa ikki fatur á teimum ílótunum, vit hava brúk fyri, sigur John Nielsen, stjóri

Stórur áhugi fyri bústevnuni í Runavík

Á framsýningarøkinum, sum verður fleiri enn 1000 fermetrar, fara umleið 50 fyritøkur, feløg og stovnar at sýna fram, hvat tey hava at bjóða innan hús, innbúgv, instalatiónir, fígging og tryggingar

BÚSTEVNAN
Vilmund Jacobsen

Runavík: Bústevnan, Hús & Innbúgv, er nú farin at nærkast. Stevnan verður hildin í ítróttarhøllini í Runavík og í einum stórum tjaldi, sum verður sett upp við síðuna av. Stevnan letur upp fríggjadagin, 4. apríl og verður opin til og við sunnudagin, 6. apríl. Samlaða framsýningarøkið verður fleiri enn 1000 fermetrar, og tað er ikki vanligt í Føroyum.

Dánial Petur Hansen, samskipari, sigur, at rættiliga stórur áhugi er fyri bústevnuni, og nærum øll framsýningarplássini eru bílogd.

- Vit eru ovfarin av undirtøkuni. Ætlanin er at hava umleið 50 framsýnarar við á stevnuni. Enn er okkurt pláss eftir, men nú er við at verða fullsett.

Hann sigur, at er onkur, sum fegin vil verða við, kunnu tey venda sær til hansara á tlf. 211949.

Breið framsýning

- Málið er at hava allar tættir við innan hús og innbúgv, og vit kunnu siga, at málið er rokkið.

Fyrireikararnir eru ovfarnir av teirri stóru undirtøku, sum bústevnan, Hús & Innbúgv, hevur fingið

Dánial Petur sigur, at á bústevnuni verða framsýnarar, sum selja timbur, køkar, baðirúm, vindeygu, tak, tún & flísar, hita & sanitet, el-instalatiónir, elútbúnað og gardinur.

- Aftrat hesum verða eisini fíggingarstovnar og tryggingarfeløg við, sigur hann.

Dánial Petur sigur, at stevnan er fyri øll, sum hugsa um bygging, umbygging ella umvælingar av sethúsum – og eisini fyri tey, sum leita eftir hugskotum innan hetta økið.

- Fleiri framsýnarar leggja eisini dent á tað nýggja, sum rørir seg innan hús og innbúgv, sigur hann.

Samskiparin sigur, at stigtakararnir eru ovfarnir av tí stóru undirtøku, sum bústevnan hevur fingið.

Ymisk tiltøk

Í samband við stevnuna verður skipað fyri ymiskum tiltøkum í Runavíkar kommunu teir dagarnar, stevnan varar.

- Handlarnir verða longri opnir, og Kunningarstovan fer at skipa fyri framsýningum, sigur Dánial Petur Hansen.

Tað verður býráðsformaðurin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, sum setir stevnuna fríggjadagin, 4. apríl.

Ætlanin er eisini at hava eitt hvørt undirhald, tá ið setanin verður.

Tað er Dekostovan, sum tekur sær av básunum.

Eldrafeløg í Eysturoy skipa fyri hugnaløtu

TILTØK
Vilmund Jacobsen

Leygarkvøldið, 29. mars, skipa trý eldrafeløg í Eysturoy fyri hugnaløtu í Handilsskúlanum á Kambsdali. Feløgini, sum hava tikið stig til hetta kvøldið, eru eldrafelagið Nón í Runavíkar kommunu, Fjallið í Leirvíkar- og Gøtu kommunu og eldrafelagið, Borgin í Fuglafjarðar kommunu.

Á hugnaløtuni fara tey, sum tað liggur í orðinum, at hugna sær við døgurða, práti, skemti, sangi og harmoniku. Annað undirhald verður eisini, bæði til gamans og álvara.

Tey, sum ætla sær at verða við til tiltakið á Kambsdali, skulu siga frá hjá einum av nevndarlimunum ella formonnunum í nevndu feløgum.

Eldrafelagið Nón veit at siga, at fleiri enn hundrað fólk longu hava boðað frá luttøku.

Tey, ið enn ikki hava teknað seg, men hava hug at verða við, kunnu venda sær til (Nón) Amy Djurhuus, tlf. 447718, (Fjallið) Herborg Joensen, tlf. 443011 og til (Borgina) Ditleif Eldevig, tlf. 444072/ 284772.

Nú kunnu føroyingar atkvøða

Til hálvfinaluna hesaferð kunnu føroyskir gsm-felagar vera við til at gera av, hvørt Guðrun Sólja Jacobsen skal við í finaluna í »Stjerne for en aften«

STJERNE FOR EN AFTEN
Jákup Mørk

Hesaferð sleppa føroyska GSM haldarar hjá Føroya Tela at atkvøða fyri Guðrun Sólju Jacobsen í kappingini »Stjerne for en aften«

Nú ber eisini til hjá føroyskum GSM-feløgum at atkvøða fyri Guðrun Sólju Jacobsen.

Hóast øll tjóðin spent fylgdi við, so var tað ikki stórvegis, sum vit føroyingar kundu gera til tess at stuðla Guðrun Sólju Jacobsen í hennara roynd at vinna seg úr undanumfarinum í sangkappingini hjá Danmarks Radio, Stjerne for en aften.

Ivaleyst vóru tó fleiri, sum heittu á vinir og kenningar í Danmark um at gera sítt til, at føroyski songfuglurin kundi vinna seg fram, men sum úrslitið av hennara innleiðandi gjørdist, so er lítil ivi um, at hon kortini hevði komið í hálvfinaluna.

Her er mótstøðan tó uttan iva harðari, men hesa ferð kann Guðrun so eisini fáa hjálp úr Føroyum. Føroya Tele og Sjónvarpið hava borið soleiðis í bandi, at tað nú eisini ber til hjá GSM feløgum hjá Føroya Tele at vera við í atkvøðugreiðsluni. Alt, sum felagarnir nýtast at gera, er at senda eini SMS boð til telefonnummar 1212 við nummarinum á tí luttakaranum, sum tey halda hevur havt bestu framførsluna. Atkvøðast kann millum 19.00 og 20.40 fríggjakvøldið, og er kostnaðurin av hesum 10 kr. fyri hvørt SMS boð.

Ebeltoft Kurcenter hevur kunningarfund

OVURVEKT
Ingrid Bjarnastein

Í dag, leygardag, klokkan 16, hevur Ebeltoft Kurcenter ein kunningarfund í auluni í Kommunuskúlanum í Havn. Tey bjóða eitt uppihald til fólk, ið eru yvirvektig.

Á kunningarfundinum kanst tú hitta dietistin, Ann Henriksen og stjóran Flemming Darre frá Ebeltoft Kurcenter. Fyrilestur verður um yvirvekt og fiti við útgangsstøði í, at fleiri enn 1000 fólk hava verið á Ebeltoft Kurcenter og Ubberup Højskole fyri at klænka.

Á einum slíkum uppihaldi verður tú leiddur runt í øllum, sum hevur við yvirvekt og fiti at gera, og eisini trupulleikararnar, sum koma av hesum. Harafturat fært tú nógv góð ráð um, hvussu tú kanst finna vegin til vekttap og finna tær ein nýggjan og sunnan lívsstíl.

Síðani byrjað varð í september 2002 hava fleiri føroyingar verið á Ebeltoft, og nógvir eru farnir heim aftur fleiri kilo lættari og við einum nýggjum lívihátti í viðførinum. Til kunningarfundin fært tú høvi at hitta nakrar av teimum, sum fortelja um, hvussu tað er á Ebeltoft.

Kunningarfundurin er ókeypis og øll eru vælkomin.

Brúkarating í Norðurlandahúsinum

Mánakvøldið komandi kl 19:30 verður brúkarating í Norðurlandahúsinum

BRÚKARAMÁL
Eirikur Lindenskov

Mándagin verður brúkarating í Norðurlandahúsinum. Í hesum sambandi er brúkaraumboðsmaðurin í Danmark, Hagen Jørgensen, á vitjan, og hann fer at greiða frá praktiska týdninginum av danskari brúkaralóggávu. Hann fer eisini at samanbera ta donsku lóggávuna við norðurlendsk og aljóða viðurskifti eins og at greiða frá sínum luti sum brúkaraumboðsmaður í Danmark.

Síðani fáa umboð fyri brúkaran, vinnuna, landsstýrið og politisku flokkarnar høvi at framføra síni sjónarmið um evni:

» Er brúk fyri nýggjari brúkaralóggávu og brúkarastovni í Føroyum? Og hvussu kunnu vit skipa brúkaravernd í Føroyum?«

Forkvinnan í Brúkarasamtakinum, Ingun Simonsen, setir fundin. Fundarstjóri verður Turid Debes Hentze, advokatur

Við pallborðið verða luttakararnar: Brúkarasamtakið: Hans Pauli Strøm, skrivari, Vinnuhúsið: Jan Mortensen, stjóri, Landsstýrismaður í vinnumálum, og umboð fyri Fólkaflokkin: Bjarni Djurholm, Sambandsflokkurin: Alfred Olsen, løgtingsmaður, Javnaðarflokkurin: Kristian Magnussen, løgtingsmaður Sjálvstýrisflokkurin: Kári P. Højgaard, løgtingsmaður Tjóðveldisflokkurin: Finnur Helmsdal, løgtingsmaður, Miðflokkurin: Álvur Kirke, floksformaður

– Vónandi møta fólk fjølment, so brúkarar kunnu nýta hetta høvið at koma til orðanna og gera vart við støðu okkara og ger krøv, sum mugu setast fyri at bøta um viðurskiftini hjá brúkarum í Føroyum, siga fyrireikararnir, sum heilsa nýggjum limum vælkomnum at tekna seg sum lim í Brúkararáðnum.

Pallborðsfundur um livikor føroyinga

Hvussu eru livikor føroyinga? Tveir fyrilestrar og pallborðsfundur um hagtalslýsingar av livikorum verða í komandi viku

GRANSKING
Tíðindaskriv

Sum kunnugt er stórur tørvur á hagtølum, sum kunnu lýsa føroyska samfelagið. Bæði í samfelagsgransking, í almennari fyrisitng og í vinnulívinum hevur tað alstóran týðning at fáa álítandi tøl at arbeiða við.

27.-29. mars verður ráðstevna hildin í Havn, har 17 granskarar úr øllum norðurlondum fara at hittast at tosa um, hvussu vit kunnu skipa hagtøl um vælferð, arbeiðsmarknað og javnstøðu, so at tey í granskingarhøpi eru sambærilig um landamørk.

Føroyska støðan er serliga trupul, tí her eru stór hol í hagtalsgrunninum. Ikki vita vit, hvønn førleika og hvørjar útbúgvingar fólk hava her á landi, lítið um hvussu arbeiðsmarknaðurin er samansettur, um umsorgan av børnum og gomlum, osfr. Tí skipa Hagstovan og Fróðskaparsetrið fyri tveimum almennum fundum undir ráðstevnuni. Her fara serfrøðingar at halda fyrilestrar, pallborð verður við føroyskum luttakarum, og alment orðaskifti um málið.

Fyrri fundurin verður hósdag 27. mars kl 19.00 í Sjómansskúlahøllini.

Skrá sær soleiðis út:
1. Fyrilestur: mag.soc. Kari Skrede, granskingarstjóri fyri demografi- og livikorsgransking á Statistisk Sentralbyrå í Noregi.
2. Beinta í Jákupsstovu, cand.polit, Høgskolen i Molde, greiðir stutt frá støðuni í Føroyum

Stuttur kaffisteðgur

3. Pallborð og orðaskifti.

Fundarstjóri:
Malan Marnersdóttir, rektari fyri Fróðskaparsetri Føroya.

Pallborðsluttakarar:
Hermann Oskarsson, cand. polit., stjóri á Hagstovu Føroya, Annika Wardum Joensen, cand.negot., forkvinna í Javnstøðunevndini, Susanne Johanson, fil.dr., granskari við universitetið í Kalmar, Kjartan Ólafsson, sosiologur á granskarstovninum á universitetinum í Akureyri

Seinni fundurin verður fríggjadag 28. mars kl 14.00 í Sjómansskúlahøllini. Tá verður evnið: Hvussu fáa vit tøl sum lýsa livikor, javnrættindi og arbeiðsmarknað?

Skráin sær soleiðis út:
1. Fyrilestur: Paul Inge Severeide, leiðari fyri fólka- og bústaðarteljingini, sum Statistisk Sentralbyrå gjørdi í Noregi í 2001.
2. Hans Pauli Strøm, sosiologur, Hagstova Føroya, hevur stutt upplegg um tørvin á einari (síðstu) fólka- og bústaðarteljing í Føroyum.

Stuttur kaffisteðgur

3. Pallborð og orðaskifti.

Fundarstjóri:
Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni

Pallborðsluttakarar:
Birger Poppel, stjóri á Grønlands Statistik, Jógvan Mørkøre, cand.scient.pol., Fróðskaparsetur Føroya, Petra Joensen, stjóri á Almannastovuni, Bjørgfríð Ludvig, cand.scient.adm., Vinnuhúsið

Hagstovan, Søgu- og samfelagsdeildin á Fróðskaparsetrinum og føroysku umboðini í tí norðurlendsku verkætlanini skipa fyri ráðstevnuni í Havn. Fíggjarstuðul er fingin til vega frá Almannamálaráðnum, Familju- og heilsumálaráðnum, Vísindagrunni Sparikassans og Vinnulívsgrunninum.

Hetta er ein partur av trý ára norðurlendskari verkætlan, sum partvís er stuðlað av Nordisk Ministerráð, partvís av teimum ymisku granskingarstovnunum, har hesi fólk arbeiða.

Útlendskir gestir sum koma til Granskingarráðstevnuna um vælferðarhagtøl

Frá Statistisk Sentralbyrå, Oslo:
1. Kari Skrede, Forskningssjef, leder for seksjon for Demografi og levekårsforskning
2. Per-Inge Severeide, Prosjektleder for Folke- og boligtellingen 2001

Frá Grønlands Statistik, Nuuk:
3. Birger Poppel Statistikchef

Umboð fyri "Vælferdsprogrammet", Nordisk Ministerráð:
4. Steinar Kristiansen, rådgiver, Norges Forskningsråd, Oslo

Frá verkætlanini "Women leave, men remain…" (stuðlað gjøgnum "Vælferdsprogrammet"):

Úr Grønlandi:
5. Wolfgang Kahlig Lektor, Institut for Administration, Ilisimatusarfik/Grønlands Universitet, Nuuk

Úr Íslandi:
6. Kjartan Ólafsson Sosiologur, Rannsóknastofnun Háskólans á Akureyri
7. Hjørdis Sigursteinsdóttir Sosiologur, Rannsóknastofnun Háskólans á Akureyri

Úr Noregi:
8. Anna-Karin Berglund, leiðari fyri verkætlanina Fil.Dr. kulturgeografi, NORUT Finnmark, Alta
9. Britt Kramvig, cand.-polit, sosialantropologi, NORUT Finnmark, Alta
10. Birgit Abelsen, cand. scient, NORUT Finnmark, Alta
11. Inge Berg Nilssen Forsker, Norut Finnmark, Alta
12. Kirsten Stien cand.polit, Barnevernets utviklingssenter i Nord-Norge, Tromsø Universitet

Úr Svøríki
13. Susanne Johansen, Fil.dr. Kulturgeografi, Kalmar Universitet
14. Marie Nordfeldt Fil.dr. Kulturgeografi, Sköndalsinstitutet, Stockholm
15. Susanne Stenbacka Fil.dr. Kulturgeografi, Kulturgeografiska Institutionen, Uppsala Universitet

Úr Finnlandi
16. Liisa Westman, PhD, avd. sos.pol., Universitetet i Joensuu

Fyri Føroyar
17. Beinta í Jákupsstovu, cand.polit. statsvitenskap, lektor, Høgskolen i Molde, Noreg